HEILSANIR

Góða didda
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum, og takk fyri at tú ert so góð við okkum.
Heilsan Ronja og beiggjarnir

Hey Hildur
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum. Tú er ein góður Kyndils-áskoðari. Vit gleða okkum tl komandi kappingarár.
Heilsan ein annar áskoðari

Elskaði Sunnleif
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum. Alt tað besta í framtíðini.
Heilsan omma, abbi og Terji-gubbi

Góði elskaði Bárður
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 21. mai. Eg elski teg yvir alt.
Ynskir mamma

Góða Hildur
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum 23. mars. Hetta kvøldið var tað stuttligt.
Heilsan vinir

Góði elskaði Bárður
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum. Jesus fylgir tær á lívsleið tíðini.
Heilsan omma og abbi

Til Joen Hendrik á Urmagerstien 18
Góði Joen Hendrik. Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum tann 7. mai.
Ynskja omma, abbi og Elin Simona

Hallow túwe
Minnist tú hvat tú fert við taskuni. Skikka tær nú pent á tínum 16 ára degi.
Heilsan gita hvør

Hey góða
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum 20. mai. Nú er tað aftur flóvisligt at fylgjast við tær.
Kristvør

Til Lailu í Århus
Góða Laila. Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum tann 21. mai. eisini ein heilsa til Tonju Elin.
Ynskja omma, abbi og Elin Simona

FJARSTÝRDUR BILUR
Ein fjarstýrdur bilur við bensin og ein modelbátur til sølu.
Ring 250157

GAMLIR SKÓTAR TIL GONGU
Sunnudagin komandi, 25. mai, er ætlanin at savna saman allar fyrrverandi og núverandi leiðarar og gamlar skótar frá tíðini á Bakkahellu og fram til dagin í dag, sum hava virkað í Skótaliði Sigmunds Brestissonar og Tóru Sigmundsdóttir, til ein gongutúr niðan á Húsareyn og so viðari haðani. Ferðaleiðari verður Tryggvi Sondum. Aftan á gongutúrin verður farið oman í skótahøllina til ein drekkamunn, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi. Til ber at melda seg til gongutúrin hjá Tryggva, tel 313429, hjá Høgna tel 328145/211030 ella hjá Hildur
tel 319418/219418

FARTELEFON TIL SØLU
1 ára gomul sera væl viðfarin Siemens e30 fartelefon til sølu fyri einans 500 kr.
Tlf. 317836

S.O.S. ÁRGANGUR 77–80
8–10. flokkur á Felagsskúlanum. Nú nærkast tíðin til vit skulu hittast. Seinasta freist at tekna seg er 1. juni hjá
Jónveig, tlf. 214436, Esther, tlf. 282220, Maria,

TVEY SKATEBOARD
til sølu fyri 300 kr. 150 kr. stk. 1 Mold Skateboard og 1 Street skateboard.
Tlf. 318428

BAÐIRÚMSMØBLAR ÚR FURU
4 undirskáp, 2 undirskáp, spegl v/ljósi, vask og krana til sølu. Prísur 2.000 kr.
Tlf. 317502

TIL SØLU
- Canon IXUS L-1 APS kamera i lædderetui 900 kr. (nypris 2.200 kr). - Nikkon F-65 spejlrefleks 28-80mm og 70-300mm original zoom i taske 3.000 kr. (nypris 6.000 kr.)
Tel. 214696

NOKIA 6610 TIL SØLU
Litskerm, MMS, Java, polyfoniskar ringitónar, spøl, GPRS, útvarp og mangt annað. Telefonin hevur nýtt cover, virkar perfekt og er uttan simlock. Til sølu fyri einans 2.500,-
ring +45 26275314

VINDEYGU
2 vindeygu 120 x 60 ella minni (nýtast ikki at kunna latast upp) ynskjast til keyps.
Tlf. 447565

KARATE
Vit taka inn nýggjar limir tann 19. mai til og við 9. juni. Møguligt er at melda seg til á tlf. 224721 ella við at møta upp. Vant verður 3 ferðir um vikuna (mán/mik/fri) kl. 19.30-20.30. Vant verður í Argja Róðrarfelag.
Havnar Karate Felag

HEY
Kann eg vera so heldig, at onkur hevur funnið eina Nokia fartelefon við ymsum litum? T.d. í Kagganum leygarkvøldið 10. mai, so vinarliga ring
256039

SEYMIMASKINA TIL SØLU
óútpakkað seymimaskina til sølu vegna feilkeyp.
Tlf. 210261

GÁVUKORT
til ein Apex ferðaseðil til sølu við avsláttri.
Tlf. 312659

VINDEYGU
Tvey brúkt vindeygu 138,5 x 107,5 fost við termoglasi, í góðum standi – bíliga til sølu.
Tlf. 448310

FØROYA KOLVETNI
Partabrøv í Føroya Kolvetni ynskjast til keyps.
gasco@mail.com

ÍSLAND-FØROYAR
Nú eru fá pláss eftir til túrin hjá 12. manni til Reykjavíkar 5.-8. juni. Ring og hoyr meira. www.footballsupporters.fo
12. maður tlf. 213212

FØROYSKAR BROTFLÍSAR
Hevur nakar nakrar fáar stórar føroyskar brotflísar at selja mær.
Tlf. 217330 ella 317330

MODELFLÚGVARI TIL SØLU
við ollum, sær gott út og hevur flogið 2 ferðir. Alt riggar sum tað skal. Prísur 5.500,-
Tlf. 226880

STUNT RULLUSKOYTUR
merki Bauer str. 42 1/2, hjól stødd 56/88 ABEC 3. Rollerblade trygdarútstýr fylgir við. 1350,- kr.
Tlf. 264421

TIL SØLU
Junior Golfsett til sølu.
Tlf. 229999

MYNDATÓL TIL SØLU
1 1/2 ára gamal Minolta Dynax 505si kassi til sølu fyri 1.800 kr. 1 ára gamalt Minolta 3500 xi blitz til sølu fyri 1.500 kr. 1 ára gomul Tamron 28-300 mm. aspherisk linsa. til sølu fyri 5.000 kr. Samlað til sølu fyri einans 7.500 kr., nýprísur 13.000 kr.
Tlf. 260590

UM HÓSKANDI BOÐ
er frímerki stemplað 1907 til sølu.
Tlf. 255584

TIL SØLU
Óbrúkt H-vindeyga frá Vatnsoyra snikkaravirki við kunstigum sprossum – stødd 80 x 120 1500 kr.
Tlf. 221369

NOKIA 3310
fartelefon við tekniprogramm og tastaturlás til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 321176, Páll

FERÐ FYRI TVEY
við Norrønu til Bergen fram og aftur. Gist í 4 koyggjukamari v/ wc og bað, til sølu við avsláttri.
Tlf. 313913

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »Heilsanir«

Jógvan Elias Thomassen leggur frá sær á Landssjúkrahúsinum

Seinnapartin í dag, fríggjadagin hin 23. mai, hevur Landssjúkrahúsið fráfaringarsamkomu (reseptión) fyri Jógvan Elias Thomassen. Og hann er í sjúkrahúshøpi ikki hvør sum helst, síðani hann í samfull 36 ár trúfast og óslitið hevur tænt hesum stovni í fleiri kravmiklum álitisstørvum.

Jógvan Elias er úr góðum bergi brotin og eitur eftir abba sínum, einum í síni tíð so virknum og framburðshugaðum vinnulívsmanni, at honum m.a. varð ognað eitt bind av Føroya Siglingarsøgu.

Mamma Jógvan Elias var av Højgaardsfólkunum, sum í síni tíð brutu upp úr nýggjum í Rituvík.

Sjálvur fór Jógvan Elias blaðungur burtur av oynni í framhaldsskúla, sum tá á døgum mundi falla fáum ungfólkum í lut.

Heimafturkomin arbeiddi hann árini 1955-57 sum skrivstovumaður í fedranna handils-og útgerðarfyritøku.

Næstu 2 árini er hann so niðri at nema sær statsgóðkendan handilskunnleika og haðani beinleiðis til London til framhaldsútbúgving.

Árini 1958-60 er hann so aftur til arbeiðis heima í familjufyritøkuni, fyri síðani næstu 2 árini at starvast í grannskoðarafyritøku niðri.

Sostatt skuldi Jógvan Elias verið væl fyri bæði í ástøði og verki innan figgjarviðurskifti og umsiting.

Enn einaferð heimafturkomin, starvaðist hann fyrst í samfull 6 ár sum bókhaldari hjá eini av størstu byggifyritøkunum við stórum anleggsarbeiði kring alt landið.

Tíðliga í 1967 fær hann so starv á Landssjúkrahúsinum sum assistentur á lønardeildini.

Tað man hava verið dugur í honum, tí fá ár seinni er hann royndarsettur yvirassistentur, og stutt eftir gerst hann innan sítt yrki tænastumaður undir danska Innanríkisráðnum, sum um tað mundi bygdi og figgjaði eitt nýtt og stórt sinnissjúkrahús (Statshospitalið) í Havn.

Hann gjørdist leiðari av lønardeildini, sum síðani gjørdist hin sama fyri alt sjúkrahúsvirksemi í Havn.

Men tað var meira boð eftir honum. Fyrst gjørdist hann fyribilssettur og virkandi varasjúkrahúsleiðari, síðani fatsur í tí starvinum og at enda hava í fleiri umførum verið boð eftir honum at virka á ovastu rók sum beinleiðis sjúkrahúsleiðari, tá tað hava verið rembingar í sjúkrahúsfyrisitingini.

Aftaná seinastu bygnaðarbroytingar í ovastu sjúkrahúsleiðsluni, hevur hann verið leiðari fyri tænastudepilin.

Eyðvitað hevur Jógvan Elias við sínum mongu virkisárum í nógvum ábygdarstørvum á landsins størsta, fjøltáttaða arbeiðsplássi havt ein sera centralan leik, og sum tann trúgvi og støðufasti tænastumaðurin havt ómetaligan týdning fyri skiftandi leiðslur longri uppi í systeminum.

Hann var maðurin sum hevði eygað fyri øllum, kendi mannagongdir og visti beskeð, og við sínum gløggskygni og sáttliga atburði man hann ikki sjáldan hava átt lykilin til nógvar torførar støður.

Og tí hevur tað so ofta verið litið honum til at taka róðrið í truplum tíðarskeiðum.

Sum leiðari hevur hann, umframt sín fakliga førning, havt ein fyrikomandi verumáta, verið beskeðin og gjørt sær ómak at ferðast millum fólkið og lurtað.

»Spyr Jógvan Elias« hevur so mangan verið svarað í truplum ivaspurningum.

Sum tænastumaður hevur Jógvan Elias verið lýðin og loyalur yvirfyri síni yvirvøld, og eg ivist ikki í, at hann sum so hevur verið settur at útinna eitt og annað, sum hann helst vildi verið fyri uttan, men ongantíð hevur hann, tættur sum fløskan, latið upp sín munn og beklaðað seg.

Og hann lat heldur ikki við seg koma, tá hann einaferð í serliga truplum tíðarskeiði fekk eitt strik ella bæði tvey.

Frá meinigum fólkum í húsinum veit eg, at hann í sínum avgerðum hevur verið rættvísur, praktiskur og mildur.

Jógvan Elias giftast í 1961 Sonju úr heimbygdini, dóttir teirra Dal-Hans (Gásadals) og Honnu úr Lambastovuni í Sørvági.

Tey hava alt sítt hjúnalag búð í einum av hasum snotuligu reyðu húsunum í Kardemummubýnum og eiga synirnar Sakaris og Hans.

Sakaris er sjúkrahús-portørur og var forrestin annar av hasum virðiligu monnunum, sum herfyri í SVF greiddu frá um at taka hond um deyð fólk.

Hans er sjálvstøðugur timburmeistari og sjáldsama knáur at spæla golf.

Tað er nústaðni fyri fáum árum síðan, at Jógvan Elias og tey fingu sær bát, og so væl dámar Jógvan Eliasi og Sonju við at flota, at tað man vera ein rár fríløta, at tú ikki sært ta dámligu sjón ella kann hitta tey bæði saman á báti uppi í fjørðinum.

Tað hevur verið mær ein gleði at verið saman við Jógvan Eliasi eitt langt arbeiðslív og eisini at kenna hesi fólk, sum eru trúfast sum trøllið, eitt sindur privat, og við hesum fátæksligu orðum vilja vit bæði, konan og eg, ynskja tykkum alt gott í framtíðini.

EyJo

Frumsýning
Fríggjadagin 23.05. kl. 18[00] Fríggjadagin 23.05. kl. 23[30]
Leygardagin 24.05. kl. 18[00] Leygardagin 24.05. kl. 23[30]
Sunnudagin 25.05. kl. 18[00] Sunnudagin 25.05. kl. 23[00]

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
P Tlf. 311956 P
www.bio.fo



Fríggjadagin 23.05. kl. 21[00] Leygardagin 24.05. kl. 21[00]
Sunnudagin 25.05. kl. 20[30]

Fríggjadagin 23.05. kl. 20[00] Fríggjadagin 23.05. kl. 23[00]
Leygardagin 24.05. kl. 20[00] Leygardagin 24.05. kl. 23[00]
Sunnudagin 25.05. kl. 19[30] Sunnudagin 25.05. kl. 22[15]

KOMANDI FILMUR

Frumsýning Mikudagin 28.05.

P **BIO KIOSKIN** P
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.